## Aliráðstevnan 2010

Aliráðstevnan 2010 verður fríggjadagin 26. februar. Seinasta freist at melda seg til aliráðstevnuna 2010, sum verður fríggjadagin, er í morgin 23. februar. Árliga aliráðstevnan verður fríggjadagin. Higartil eru 194 fólk tilmeldað ráðstevnuna og er hetta nakað væl meira enn seinasta ár.Tilmelding til aliráðstevnuna kann gerast umvegis heimasíðuna hjá Vinnuhúsinum www.industry.fo har eisini nærri upplýsingar eru um skrá o.a.



## Tak-kollaps kannast

Ógvusligi kavin í Danmark seinastu tíðina hevur ført til, at fleiri tøk á fjósum og landbrúksbygningum eru rapað saman. Í Norðurjútlandi, sum er harðast rakt, eru upp móti 100 tøkum rapað saman seinastu vikuna. Í landbrúksfelagnum í Norðurjútlandi, Landbonord, undrast tey um, at teir fleiri túsund fermetrarnir av taki ikki megna at halda ímóti trýstinum. Formaðurin í høvuðsnevndini, Niels Vestergaard Stalling, metir málið ógvuliga álvarsamt. Tí hevur nevndin eisini sett ein bólk við fimm serfrøðingum, sum skulu kanna og loysa loyndarmálið um niðurdotnu tøkini.

# Donsku oljukeldurnar tómar um fá ár

**Oljan og gassið í tí danska partinum av Norðsjónum fara at ganga undan. Tað fer at gera holið í ríkiskassanum enn størri, enn tað er, samstundis sum Danmark verður meiri heft at orku úr útlondum**

OLJA OG BÚSKAPUR
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*



*Danski ríkiskassin missir nógvar milliardir krónur um árið, tá oljukeldurnar í Norðsjónum torna upp*

*Mynd: DR*

Longu um tvey ár noyðast danir at keypa meiri kol, olju, gass og grøna orku úr útlondum, ella teir sjálvir selja av landinum. Tað stendur at lesa í einari nýggjari meting, sum Orkustýrið hevur gjørt. Úrslitið kemur óvart á danir, tí eftir teirri gomlu metingini fór Danmark at hava avlop í orkusamhandlinum líka til 2015. Men nú kemur vendin longu í 2012.

– Tað er sera ørkymlandi, og hetta merkir samstundis, at vit mugu taka okkum um reiggj og bera skjótt at, um vit ikki skulu koma í eina støðu sum hana í sjeytiárunum, sigur Lykke Friis, veðurlags- og orkumálaráðharri, við Politiken.

### Tómt um 9 ár

Eftir metingini hjá Orkustýrinum fer danska oljuframleiðslan í Norðsjónum at minka so nógv tey næstu árini, at í 2013 verður hon á leið 40 prosent minni, enn hon var í 2008. Harafturat minkar gassframleiðslan. Metingin hjá Orkustýrinum er, at í 2013 fær ríkiskassin millum 10 og 15 milliardir krónur minni burtur úr oljuni og gassinum í Norðsjónum, enn hann fekk í 2009.

Uppaftur verri verður tað eini fimm ár seinni, tí sambært metingini hjá Orkustýrinum verður eingin olja og einki gass eftir í teimum donsku keldunum í Norðsjónum í 2018 ella í 2019.

### Russland ræðir

Danska stjórnin hevur fleiri ferðir sag tað vera umráðandi, at landið ikki verður ov heft av gassi úr Russlandi. Tað hevur sína orsøk, tí Russland hevur meiri enn eina ferð skakað ES við at steðga gassveitingini til Ukraina og harvið eisini Vesturevropa, sum fær gass ígjøgnum somu leiðingar. Politiken vísir á, at tey bæði seinastu árini er hetta hent tvær ferðir.

Orkuveiting hevur stóran trygdarpolitiskan týdning, og sum serkøn á júst tí trygdarpolitiska økinum veit danski veðurlags- og orkumálaráðharrin, hvussu týdningarmikið evnið er.

– Tað er greitt, at nøkur av teimum londum, sum vit skulu keypa dýra orku frá, hava ikki júst somu hugsjónir og virði sum vit, sigur Lykke Friis við Politiken.

### Búskaparlig avbjóðing

Søren Gath Hansen, sum er aðalstjóri í teirri almennu orkufyritøkuni Dong Energy, heldur, at tað verða avleiðingarnar fyri samfelagsbúskapin, sum verða tann største avbjóðingin. Hann sigur, at tað verður eingin trupulleiki at útvega dønum nóg mikið av olju og gasi ístaðin fyri tað, sum teir higartil hava fingið úr Norðsjónum.

– Oljan og gassið hava verið eitt munagott ískoyti til gjaldsjavnan í mong ár, og sum samfelagsborgari eri eg eitt sindur ørkymlaður av, at tað ískoytið nú fer at minka, sigur Dong-stjórin við Politiken.

# Børnini vóru ikki foreldraleys

**Teir amerikonsku trúboðararnir søgdu, at børnini, sum teir ætlaðu at flyta úr Haiti, høvdu mist foreldrini, men sambært amerikonsku tíðindastovuni Associated Press áttu øll børnini foreldur**

HAITI
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Fólk í fátækrabýlinginum Callabas beint uttan fyri høvuðsstaðin Port-au-Prince siga fyri AP, at einki av teimum 33 børnunum hevur mist foreldrini, men at foreldrini ella næstringar góvu teimum amerikonsku trúboðarunum børnini.

Tá amerikanararnir vórðu tiknir á markinum millum Haiti og Dominikanska Lýðveldið við teimum 33 børnunum, greiddu teir myndugleikunum frá, at teir høvdu gjørt eina avtalu við teir dominikonsku myndugleikarnar um at flyta børnini á eitt barnaheim har.

Men ta frágreiðingina vildu myndugleikarnir í Haiti ikki góðtaka, og hon gav heldur ikki trúboðarunum loyvi til at flyta børnini av landinum. Tí vórðu amerikanararnir tiknir og børnini tikin frá teimum.

AP skrivar, at foreldur í Callabas hava greitt frá, at tey vistu ikki síni livandi ráð aftan á jarðskjálvtan, og at tey tí lótu trúboðararnar fáa børnini, tí teir lovaðu at geva børnunum eitt betri lív.

Átta av teimum tíggju amerikanarunum vórðu latnir leysir í síðstu viku, og teir eru nú aftur í USA. Leiðarin hjá trúboðarunum, Laura Silsby, er framvegis í varðhaldi í Haiti saman við einum starvsfelaga. Ákæruvaldið í Haiti hevur skuldsett tey fyri at hava roynt at smugla tey 33 børnini av landinum. Tað avsanna trúboðararnir. Teir halda fast um, at teir høvdu ikki onnur ørindi í Haiti enn at hjálpa foreldraleysum børnum aftan á jarðskjálvtan.



*Átta av teimum tíggju amerikanarunum eru slopnir aftur til USA, men leiðari teirra er framvegis í haitiskum varðhaldi*

*Mynd: AP*